# TILTØK

## FØÐINGAR

Cecilla Skou og Jógvan Heinesen, Hellerup, hava fingið ein son. Hann var 57 cm. og vigaði 4500 gr.

27. juli fingu Mathilda Mikkelsen og Símin Pauli Viðbjørg, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. og vigaði 3050. gr.

31. juli fingu Randi Slættanes og Jesper Roos Nielsen, Argir, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3550 gr.

31. juli fingu Anna Abelsen og Vilhelm Samuelsen, Haldórsvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3150 gr.

1. august fingu Elin Hansen og Sonni Samuelsen, Hósvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3300 gr.

1. august fingu Dagmar Ludvig Mouritsen og Magni Jacobsen, Syðrugøta, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4100 gr.

1. august fingu Charlotta Justinussen, Leirvík og Edvard Højgaard, Rituvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. og vigaði 3000 gr.

2. august. fingu Gunnvá Eysturoy og Bo W. Mogensen, Argir, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 3950 gr.

2. august fingu Eyðbrith og Janus Ryggshamar, Leirvík, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3800 gr.

2. august fingu Noomi á Válinum og Hjalgrímur á Heygum, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3800 gr.

2. august fingu Nadja Olsen og Brian F. í Gong, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 3750 gr.

3. august fingu Jóngerð og Jógvan Emil Nielsen, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 4250 gr.

4. august fingu Heidi Sigurðsson, Klaksvík og Rúni Sørensen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3300 gr.

4. august fingu Jóngerð og Niels Midjord, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 2595 gr.

4. august fingu Jóhanna Bjarnadóttir Andreassen, Norðskála og Leivur Borðoy, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 4150 gr.

4. august fingu Ása Andreasen og Hannis Gislason, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 4300 gr.

4. august fingu Diana og Bent Ebbe, Skopun, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 4050 gr.

4. august fingu Esther og Jógvan, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. og vigaði 2850 gr.

4. august fingu Súsanna Davidsen og Emil Petersen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 4250 gr.

5. august fingu Jeanna Viderø og Mourits Mohr, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3200 gr.

5. august fingu Janhild og Markus Blum, Auckland, New Zealand, eina dóttur og Joran og Jack Blum eina lítlasystur. Hon var 55 cm. og vigaði 4080 gr. Hon eitur Lily Markusardóttir Blum.

5. august fingu Sóley Jensen, Argir og Jóhan Rasmussen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3350 gr.

5. august fingu Jónfríð og Hans Arni Johannesen, Nes Eysturoy, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4300 gr.

6. august fingu Súsanna og Sámal Thomasen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4500 gr.

7. august fingu Jona Dahl og Magnus Bjarnason, Tórshavn, ein son. Hann var 48 cm. og vigaði 2310 gr.

7. august fingu Meibritt Wolles Djurhuus og Sonni Djuhuus, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. og vigaði 3700 gr.

### Gudstænastur
### 11. sunnud. e. Trinitatis

*Havnar kirkja:* kl. 11, Henning Nielsen, altarg. Skriftmál kl. 10.30
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Nólsoy:* kl. 12, Sonja Klein
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Árnafjørður:* kl. 11, altar.,
*Norðaoya røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Funningur:* kl. 12, messa Emil Olsen
*Gásadalur:* kl. 11
*Mykines:* kl. 18, David Johannesen
*Glyvrar:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Hattarvík:* kl. 12, altarg.,
*Kirkja:* kl. 17, altarg., Elsa Funding
*Tvøroyri:* kl. 11, Norðurlendsk gudstænasta (í samband við bátastevnuna) Jónsvein Bech
*Hov:* kl. 11, Ólavur Rasmussen
*Porkeri:* kl. 12,
*Sumba:* kl. 17, Marianne Telling
*Leirvík:* kl. 11, altarg.,
*Funningsfjørður:* kl. 16, altarg. Uni Næs
*Skála:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Vestmanna:* kl. 11, altarg., Marjun Bæk
*Tjørnuvík:* kl. 12, altarg., Povl Bendix Knudsen
*Sandur:* kl. 12, Jákup R. Hansen

Í Fuglafirði gongur talvan fyri Ytrimissión

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti, kapt. Heidi Epland og 34 ung og eldri frá Måløy í Noreg luttaka. Kl. 18 Familjusamling, har tey vitjandi sýna drama, syngja og hava aðra framsýning. Øll eru vælkomin.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og juniormøti.

### Katólska Kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa v/ Jacques Adams í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitshúsið
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Hanus Lassen.

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10: Breyðbróting, kl. 18: Evangeliskt møti, kl. 21: Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn og kl. 20 grøðingarmøti v/ Ólavi Jacobsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 Kvøldmøti – útisetar luttaka, kl. 22 Útimøti á Vaglinum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

### Heimamissiónin
hevur útimøti leygardagin í Leynum kl. 19 og í Kvívík kl. 21.

### Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 17.30: Bøn og lovsongur. Kl. 18: Møti.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Alice Frederiksberg.
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Súsannu og Niels Martin Olsen.
Bønarmøti hvørt mánakvøld frá kl. 20-21.
Tú ert vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

### Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Símun Jacobsen og evangeliskt møti kl. 17 við sangi og vitnisburði.

### Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 18 Møti, Anfinn Eliasen tosar.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

### Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20.00 er bønarmøti, fríggjakvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti og sunnudagin kl. 18.00 møti.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við ungdóminum. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 Útimøti í Porkeri um viðrar.
Sunnudagin kl. 18 Evangeliskt møti við Palla Petersen.

### Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 18 Møti, øll eru hjartaliga vælkomin.

### Vága Gongufelag
Um viðrar verður útferð sunnudagin 11. august til Eysturoyarsillina. Túrurin byrjar við bóndagarðin hjá Rasmus Skorðheim á Selatræð kl. 13.00 og varðir í ca. 4 tímar. Aftaná verður ein máltíð á bóndans garði. Tilmelding er neyðug á 333455 ella 213455.

### Eysturoyar Gongufelag
Um viðrar verður gongutúrur sunnudagin 11. august niðan á Villingadalsfjall og Enniberg. Farið verður av Leirvík kl. 8.00. Um ikki viðrar verður gingið úr Skálabotni til Selatraðar. Møtt verður við Kelduna kl. 14.00. Meira fæst at vita á Kunningarstovunum í Eysturoynni tlf. 449449 (211449) og 444860 (225224).

### Eldrafelagið Nón: ÚTFERÐ
Vit fara útferð til Elduvíkar sunnudagin 25. aug. Farið verður frá Sjómansheiminum í Runavík kl. 11.00.
Eisini gera vit ein túr til Sands 30.8. til 1.9. Nærri boð ring 447718 ella 447242 áðrenn týsdagin 20.8.
*Eldrafelagið Nón*

### Tilhaldið
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Frá 1. juli til 17. august hava vit opið frá kl. 13-17.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

### Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

### Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

### ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

### Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

### AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

### AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

### Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

### AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

### AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

### Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

### Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

### Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

### LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

## ANDLÁT

**01. august**
Símun Sivertsen, Klaksvík, 52 ár
Kári Dalsgaard Petersen úr Havn, 66 ár
Jákup Joensen, yngri í Norðdepli sonur Súsannu og Jákup, 30 ár.
Fyrrverandi skrivstovustjóri í Kongeriget Danmarks Hypotekbank, cand jur, Olav Hildibrand Olsen, úr Árnastovu í Kunoy, búsitandi í Keypmannahavn, 76 ár

**02.08**
Eskild Fagralóm í Kollafirði, 86 ár
Gerda Magnussen í Trongisvági, 88 ár

**04.08**
Petur Oluf Jacobsen, ættaður úr Fuglafirði, búsitandi í Roslev, 58 ár
Martin Eysturdal, ættaður úr Dali, búsitandi í Klaksvík, 97 ár

**05.08**
Ása Høj á Strondum, 60 ár.



# TILTØK

### MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

### Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

### Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo
**Skrivstovan er stongd til 7. august 2002.**

### Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

### Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Opið verður aftur týsdagin 20. august 2002.

### Parkinsonfelagið
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild, e-mail: torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897, e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

### Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

### MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

### Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

### Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur: sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

### Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til umboð í starvsnevndini fyri økisnevndunum, ið síggjast á heimasíðuni, www.javni.fo
Fax: 310557 · Teldupostur: javni@post.olivant.fo

### Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

### Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

### Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

### Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

### Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

### Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

### Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

### Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

### Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

### Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
8.7.-14.7. Bert telefonviðtala.
15.7.-21.7. Stongt.
22.7.-4.8. Bert telefonviðtala.

### Føroyingafelagið í Aalborg
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis: Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

### Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa: postur@faroehouse.dk
Heimasíðan: www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

### Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang, Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 6. juli: Leif Mosekilde, tlf. 447010
Sunnudagin 7. juli: Knud Jakobsen, tlf. 423006

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Men tað, sum var mær ein vinningur, tað havi eg fyri Krists sakir hildið vera tap«.*

*Fil 3,7*

Í Gamla Testamenti verður sagt frá tí mæta konginum í Bábel, sum saman við stórmonnum sínum helt eina rimmar veitslu. Meðan gildið var í hæddini hendi nakað, sum gjørdi kongin ræðsluslignan: Fingrar sýndust, sum á mannahond, ið ritaði á kálkið á vegginum í kongshøllini; og kongur sá hondina, sum ritaði (Dán 5,5) Umráðandi var at finna ein, ið kundi lesa og týða skriftina. Boð vórðu tí send eftir Dánjali, sum trúði á hin livandi Gud. »Tú ert vigaður á vágskál, men funnin ov léttur«, læs Dánjal. Skriftin á vegginum sipaði til kongin. Hann hevði ikki eyðmýkt hjarta sítt og vent um til Gud, hóast Gud hevði talað gjøgnum faðir hansara Nebukadnezar.

Mangar ferðir og á mangan hátt hevur Gud talað til menniskju gjøgnum tíðirnar. Eftir Jesu føðing talar hann til menniskju gjøgnum sonin Jesus Kristus. Tað kom Paulus apostul at kenna á ein serstakan hátt. Eftir at hann var komin til trúgv á hin upprisna Kristus var mangt, sum fyri honum var ein vinningur »viga og funnið ov létt«. Hann legði so at siga sín fyrrverandi vinning í eina vágskál og kunnleikan um Kristus í hina. Og tað, sum vigaði mest fyri Paulusi aftaná umvendingina, var at vera funnin í Kristusi. At kenna hann og kraftina í uppreisn hansara.

Á sama hátt eru tað óteljandi onnur menniskju, sum eru vorðin steðgað í sínari meting av Kristusi. Mótvegis heimsins vísdómi er Hann ofta vigaður og funnin ov léttur. Men av eini hending, ella av einum hvørjum Guds orði, vórðu eygu teirra latin upp, og tey sóu skriftina á vegginum: sína egnu synd. Tá var bert eitt fyri neyðini og tað var at vinna Kristus og verða funnin í honum. Og er Kristus okkara vinningur koma vit at sanna tann djúpa samanhangin í sálmaorðunum:

*»Hvønn morgun mær í skál/*
*ein náði uttan mál/*
*ríkt omanvellir«.*

**Inga Poulsen Dam, prestur**

## BRÚDLEYP

Í dag, leygardagin kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Maud Winther Hentze, Skopun og Ólavur Báralíð, Sandur. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Í dag, leygardagin kl. 15.00 giftast í býráðshøllini í Klaksvík Hansy Thomsen, Klaksvík og Martin Tuohy, Esbjerg. Um veðrið verður til vildar verður vígslan úti í Grøv. Tað verður reseptión eftir vígsluna. Brúdleypið verður hildið í Betesda fyri innbodnum.

Í dag, leygardagin, giftast í Hellerup kirkju Yoon Skodsbøj Moberg, Hellerup og Bergur Hansen, Kollafjørður. Brúdleypsadressan: Carolinevej 29, 2900 Hellerup.

Í dag, leygardagin kl. 13.00 giftast í Siloa í Fuglafirði, Sonja Jacobsen og Esmar Simonsen, bæði úr Fuglafirði. Eftir vígsluna verður reseptión har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður á Muntra fyri innbodnum kl. 19.00.

Í dag, leygardagin kl. 16.00 giftast í Viðareiðis kirkju Rósa Petersen, Viðareiði og Fróði Waag, Klaksvík. Brúdleypið verður hildið í Skálanum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 17. august kl. 14.00 giftast í Saron á Viðareiði Monica Kunoy Høgnesen, Klaksvík og Timothy Sharp, USA. Móttøka verður aftaná vígsluna, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 17. august giftast í Søllerød kirkju Anne Sofie Astrup, Hellerup og Steen Nepper-Christensen, Tórshavn. Brúdleypsadr.: Vildtfogedhus, Vildtfogedvej 2, 2840 Holte.

Leygardagin 17. august kl. 14.00 giftast í Viby kirkju Elin Suzann Lassen, Tórshavn og Bennie Gandry Andersen, Århus. Brúdleypið verður hildið á Tranbjærg Kro, Hovedgaden 37, DK-8310 Tranbjerg, Århus.

Leygardagin 24. august giftast í Elim í Søldarfirði Joan Miðberg, Saltangará og Eddie Mikkelsen, Søldarfjørður. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 448695 ella 441130 innan 17. august.

Leygardagin 31. august kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni Maiken Sundsskarð og Leif Hjørleifsson Waag Høgnesen, bæði úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkoma verður á Mylnugøta 13 kl. 20.00.

Leygardagin 31. august kl. 16.00 giftast í Leirvíkar kirkju Beinta Eliasen, Leirvík og Høskuldur Einar Pálsson, Reykjavík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðar parið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 321767 ella 443078 í seinasta lagi 15. august.

## SILVURBRÚDLEYP

6. august høvdu Gudny Eikhólm og Harald Gaard Joensen, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í B36 húsinum leygardagin 10. august fyri innbodnum.

Mánadagin 2. sept. hava Petur og Andrea Kruse, Eiði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í EB-húsinum leygardagin 14. sept. kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 423281 ella 313842 áðrenn 1. sept.